# KEMUR PAUL FØROYA SKAL

**GRINDADRÁP** Kemur Paul Watson inn um okkara 12 fjórðinga sjómark, gangi eg út frá, at løgreglan tekur hann, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í uttanríkismálum

Áki Bertholdsen

- Kemur Paul Watson til Føroyar í eini roynd at steðga grindadrápi, eigur løgreglan at handtaka hann.

So greiður er Jørgen Niclasen í morgunsendingini á Rás2.

Paul Watson hevur almannakunngjørt, at hann ætlar sær til Føroyar í summar at stríðast ímóti grindadrápi.

Landsstýrismaðurin í uttanríkismálum, staðfestir, at oddamaðurin í umhvørvisfelagsskapinum, Sea Shepherd, framvegis ikki hevur betalt eina bót upp á 300.000 krónur fyri hansara ágang á okkum, einaferð, hann var her fyri fleiri árum síðani.

- So kemur Paul Watson inn um okkara 12 fjórðinga sjómark, gangi eg út frá, at løgreglan ger sína skyldu og handtekur mannin, staðfestir Jørgen Niclasen.

- Skal hann ferðast frítt í Føroyum, skal hann betala bótina fyrst, leggur hann afturat.

## Lív í vága

Men sjálvur er hann ikki so vísur í, at hann yvirhøvur kemur hendavegin, hóast hann hevur boðað frá tí.

Jørgen Niclasen vísur á, at Paul Watson hevur so ofta boðað so ofta frá, at hann kemur higar, uttan at hann ikki kemur kortini og endamálið við tí er at lokka fólk spýta pening í kassan hjá Sea Shepherd.

Sjálvur heldur landsstýrismaðurin, at størsti vandin við Paul Watson er, at hann fýrir ikki fyri at seta mannalív í vanda.




**SKAL TAKAST**

*Eg gangi út frá, at Løgreglan ger sína skyldu og handtekur Paul Watson, tá ið hann kemur higar at stríðast ímóti grindadrápið, heldur landsstýrismaðurin í uttanríkismálum*

- Í so máta er hann vandamikil og tí liggur ein stór uppgáva á løgregluni, tá ið hann kemur.

- Løgreglan skal vera tilbúgvin at steðga harðskapi og forða fyri, at mannalív verða sett í vanda, sigur Jørgen Niclasen.

- Og eg gangi utfrá, at løgreglan er væl fyrireikað og forðar fyri, at tað kemur hartil, at Paul Watson kemur í eina støðu, har mannalív verða sett í vanda, leggur hann afturat.

*aki@sosialurin.fo*

## Ongin steðgur

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í uttanríkismálum, er alt annað enn samdur við teimum sum halda, at vit eiga at steðga við øllum grindadrápi ímeðan Paul Watson er her.

Tvørturímóti mælir hann staðiliga frá, at vit halda grindasteðg ímeðan hann er her.

- Skulu vit steðga við grindadrápi, hvørja ferð onkur umhvørvisstríðsmaður kemur higar, kunnu vit vera púra vís í, at heilt nógv umhvørvisfólk fara at koma higar at steðga okkum.

- Tí skulu vit ikki leggja okkum fløt og geva eftir fyri trýsti frá umhvørvisfelagsskapum – og so slett ikki einum yvirgangskendum og lítið umtóktum umhvørvismanni, sum Paul Watson, ið ikki fýrir fyri at seta mannalív í vága, sigur landsstýrismaðurin.